Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 31. oktober 2023
Mál nr.: 23/21297-14
Málsviðgjørt: HP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022 og løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1 a. ... *Stk. 2.* Hjálparískoyti kann veitast til húski, ið lúka treytirnar í hesi løgtingslóg. *Stk. 3*…. *Stk. 4*….	**1.** Í § 1 a, stk. 2 verður aftan á "Hjálparískoyti" sett: "og orkuískoyti".
§ 1 a. … *Stk. 2*…	**2.** Í § 1 a, stk. 3, tvær staðni í § 8 a, stk. 1, § 8 a, stk. 4, sum verður stk. 5 og § 10 a verður "oljuískoyti ella hjálparískoyti"

Stk. 3. Treytin í § 1, stk. 1 um, at húskið skal hava heimabúgvandi børn undir 18 ár, er ikki ein treyt fyri at fáa rætt til oljuískoyti ella hjálparískoyti. *Stk. 4*.... **§ 8 a.** Umsókn um oljuískoyti ella hjálparískoyti skal latast Almannaverkinum. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um oljuískoyti ella hjálparískoyti. *Stk. 2*.... *Stk. 3*.... *Stk. 4.* Almannaverkið kann útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um oljuískoyti ella hjálparískoyti frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið hava kunnleika til viðurskiftini. *Stk. 5*.... **§ 10 a.** Hevur persónur av órøttum fingið oljuískoyti ella hjálparískoyti, og átti hann at vitað um hetta, eru ásetingarnar í § 10 galdandi.	broytt til: "oljuískoyti, hjálparískoyti ella orkuískoyti".
	3. Aftan á § 2 d verður sett: "**§ 2 e.** Orkuískoyti sambært § 1 a er 5.000 kr. og kann útgjaldast eina ferð um árið í árunum 2024 til og við 2026. *Stk. 2.* Húski, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag á 275.000 kr., kann fáa orkuískoyti."
§ 4 a. Í sambandi við oljuískoyti og hjálparískoyti skal inntøka hjá øllum vaksnum persónum í húskinum roknast við í inntøkugrundarlagið. *Stk. 2.* Inntøkugrundarlagið, sum oljuískoyti og hjálparískoyti er grundað á, er inntøkan nevnd í § 7, stk. 1 og 3. *Stk. 3.* Fyri A-inntøku er inntøkutíðarskeiðið, sum oljuískoyti og hjálparískoyti verður grundað á, inntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Fyri B-inntøku og vinning sambært kapitalvinningsskattalógini er inntøkutíðarskeiðið, ið oljuískoyti og	**4.** Í § 4 a, stk. 1 og 2 og tvær staðni í stk. 3 verður "oljuískoyti og hjálparískoyti" broytt til: "oljuískoyti, hjálparískoyti og orkuískoyti".

hjálparíkoyti verður grundað á, inntøkan seinasta álíknaða inntøkuár. *Stk. 4*....	
§ 8 a. … *Stk. 2.* Umsókn um oljuíkoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. november 2022. *Stk. 3.* Umsókn um hjálparíkoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2023. *Stk. 4*... *Stk. 5*…	**5.** Í § 8 a verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 4.* Freistin at lata Almannaverkinum umsókn um orkuíkoyti er 30. juni á hvørjum árið. Seinasta freist at søkja um orkuíkoyti er 30. juni 2026." Stk. 4 og 5 verða eftir hetta stk. 5 og 6.
§ 8 a. … *Stk. 2* … *Stk. 3* … *Stk. 4* … *Stk. 5*. Oljuíkoyti og hjálparíkoyti verður útgoldið sum ein upphædd til ein persón í húskinum. **§ 11 a.** Oljuíkoyti og hjálparíkoyti kann ikki verða veitt húski, ið telur eitt ella tvey vaksin, um tey eiga ogn, ið er mett til eina upphædd omanfyri 50.000 kr. *Stk. 2.* Oljuíkoyti og hjálparíkoyti kann ikki verða veitt húski, ið telur trý ella fleiri vaksin, um tey eiga ogn, ið er mett til eina upphædd omanfyri 70.000 kr. *Stk. 3*.... *Stk. 4*....	**6.** Í § 8 a, stk. 5, sum verður stk. 6, og § 11 a, stk. 1 og 2 verður "Oljuíkoyti og hjálparíkoyti" broytt til: "Oljuíkoyti, hjálparíkoyti og orkuíkoyti".
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. februar 2024.